## DAGSINS MEINING

# Føroyar á musikalska heimskortið

Eitt væl unt og hjartaligt tillukku til føroyska tónlistamannin, tónaskaldið Sunleif Rasmussen fyri at hava fingið tann største heiður og viðurkenning, sum nakar føroyskur tónlistamaður nakrantíð hevur fingið.

At føroyska tónaskaldið Sunleif Rasmussen nú fær tónlistaheiðursløn Norðurlandaráðsins er einki minni enn eitt bragd. Tað er ikki bert ein viðurkenning av hansara egnu gávum og evnum, men eisini eitt týðandi stig og lógvatak fyri tónleik, tónleikarar og tónlistafólk í Føroyum sum heild.

Vit hava fostrað og eiga nógvar góðar musikarar og tónaskøld, og hetta kunnu vit ikki minst takka teirri undirvísing og tí musikalska umhørvinum, sum er her á landi. Tað merkir tó ikki, at vit eiga at vera nøgd við tað, tí enn er langt á mál. Men hesin heiður eigur meira enn nakað at seta nettupp tónleikaundirvísing og eitt gott tónlistaligt umhvørvi enn meira í fokus. Heldur enn bara at seta okkum afturá og fegnast um hetta frálíka úrslit og halda, at nú er vunnið á mál, eiga vit at brúka høvið til at leggja enn meira orku frá almennari síðu til nettupp at menna hetta so týðandi økið. Okkara evnaríku og gávaðu tónlistafólk eiga at fáa góðar umstøður at virka undir, soleiðis at tey umframt at menna seg sjálvi, eisini kunnu vera til eggjan og íblástur fyri onnur.

Tað er so nettupp tað henda viðurkenningin av Sunleivi Rasmussen kann fáa. Hon hevur tí ikki bara týdning fyri hann sjálvan men er eisini við at at senda út nøkur so týðandi signal til alt tónleikaøkið í landinum. Hon birtur uppundir motivatiónina hjá øðrum professionellum tónlistafólkum. Hon er við at leggja spírar hjá mongum amatøri. Hon er við til at byggja brýr millum áhugalistina og ta professionellu. Og hetta er gott. Gott fyri okkum øll.

Eitt samfelag, sum brúkar nógva orku uppá at menna tónleikaumhvørvið og tónlistina er eitt sunt samfelag. Men tónlistin er so bert ein av teimum mongu skapandi listagreinunum innan okkara livandi mentan. Aðrar eru, sum eisini hava fingið bæði lokala og altjóða viðurkenning, og her hugsa vit serstakliga um William Heinesen, Róa Patursson og Jóanes Nielsen fyri ikki at tosa um mangar aðrar føroyskar listamenn, sum hava víst framúrskarandi gávur í listaverkum sínum tað verið seg innan tónleik, skaldskap, leiklist, málningalist eitt nú Regin Dahl, Ingolf av Reyni og Jens Pauli Heinesen.

Hóast smáar og lítillætnar hava Føroyar fostrað mong góð og evnaríK listafólk. Sunleif er so enn eitt av hesum listafólkum, sum við síni altjóða viðurkenning fer at geva okkara samleika størri innihald og sum fer at seta Føroyar og føroyingar enn dyggari á heimskortið. Hjartaliga tillukku.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vestmanna Kommuna vil hava Fiskivinnuskúlan

**Vegna Vestmanna Kommunu**
*Mia Pedersen, varaborgarstjóri*

Vestmanna Kommuna frætti í fjølmiðlunum leygardagin 8. juni 2002 at Mentamálaráðið hevði slept ætlanunum um at keypa bygningin á matr. nr. 216s til fiskivinnuskúla – hetta, tí at ráðgevararnir hjá ráðnum mæltu frá keypinum, tí at partur av bygninginum var sjunkaður.

Tað tykist kommununi sera løgið, at ráðið kann taka eina slíka avgerð bert út frá nøkrum hæddarmátingum, sum ráðgevararnir hava gjørt av bygninginum.

Væl er partur av bygninginum sjunkaður, men hevði ikki verið rættast at gjørt veruligar botnkanningar, fyri at finna útav støðufestinum í undirlendinum?

Út frá nøkrum fáum hæddarmátingum er neyvan gjørligt at meta, um sjunkingin er hend innan fyri tann fyrsta mánaðin, tað fyrsta árið, ella yvir alt tíðarskeiðið, síðani bygningurin varð gjørdur!

Vestmanna Kommuna fer tí hervið at heita á Mentamálaráðið um at gera veruligar botnkanningar av undirlendinum undir bygninginum, áðrenn endalig støða verður tikin í málinum.

Um Mentamálaráðið heldur fast við tiknu avgerðina, fer Vestmanna Kommuna hervið at minna ráðið á, at kommunan áður hevur givið tilsøgn um byggibúgvið grundøki til nýggjan fiskivinnuskúla og sjódepil!

Hetta er gjørd á fundum 16. juli 1998 og 6. september 2001 við ávikavist Signar á Brúnni og Óla Holm, táverandi landsstýrismenn.

Henda tilsøgn var eisini grundin til, at Vestmanna Bygdarráð í skrivi til Mentamálaráðið, dagf. 1. mai 2002, boðaði frá samtykt um at lata skúlanum undirlendið undir bygninginum á matr. nr. 216s til ognar.

Hervið skal boðast frá, at Vestmanna Kommuna stendur fast við tilsøgnirnar, bæði viðvíkjandi undirlendinum undir matr. nr. 216s og eisini um annað byggibúgvið grundøki, um ætlanin viðvíkjandi matr. nr. 216s verður endaliga slept.

# Bólkur settur at loysa hølistrupulleikan

**Annlis Bjarkhamar, landsstýriskvinna í mentamálum, hevur sett ein skjóttarbeiðandi bólk, sum skal finna eina varandi loysn fyri Fiskivinnuskúlan í Vestmanna**

FISKIVINNUSKÚLIN
*Eirikur Lindenskov*



*Annlis Bjarkhamar, landsstýriskvinna í mentamálum, sigur, at ein varandi hølisloysn skal finnast fyri Fiskivinnuskúlan í Vestmanna*

Landsstýriskvinnan í mentamálum, Annlis Bjarkhamar, er fullgreið um, at hølisumstøðurnar hjá Fiskivinnuskúlanum ikki eru nøktandi. Hon sigur, at Mentamálastýrið í eina tíð hevur arbeitt við at loysa hendan trupulleika, sum kom upp, nú tað kom fram, at høllin inni á Fjørð í Vestmanna ikki verður keypt til endamálið, sum annars varð ætlað.

– Ætlanin um at keypa høllina inni á Fjørð í Vestmanna gjørdist tíverri av ongum, orsakað av, at niðurstøðan í eini tekniskari kanning var, at nevnda høll ikki lýkur allar tær treyitr, sum verða settar til ein útbygdan sjódepil á staðnum. Tí er gjørt av at seta ein skjóttarbeiðandi bólk, umboðandi mentamálastýrið, skúlan og byggiumsitingina, sum skal koma við uppskoti um eina loysn á hølistrupulleikanum hjá skúlanum, soleiðis at ein varandi loysn kann finnast í Vestmanna, sigur hon.

Til tann loysnin er funnin, verður arbeitt við at útvega neyðugu hølini, ið kunnu hýsa einum øktum næmingatali á skúlanum, sigur landsstýriskvinnan.

– Tað verður sæð fram til, at nýggja yrkisútbúgvingin innan fiskavirking og havbúnað, sum ætlanin er at skipa á skúlanum, fær góða undirtøku, og at skúlin við hesum nýggju næmingunum framhaldandi leggur lunnar undir førleikamenningina innan høvuðsvinnu okkara, sigur Annlis Bjarkhamar.

Eins og í grannalondum okkara verður hetta mett sum ein týðandi partur av framtíðar grundarlagnum undir fiskivinnuni.

– Tí vil Mentamálastýrið raðfesta Fiskivinnuskúlan høgt og annars leggja stóran dent á, at tess partur ikki liggur eftir, tá neyðugu karmarnir skulu skipast, sigur hon.

At enda sigur landsstýriskvinnan, at tað er undrunarvert, at ivi verður sáddur um eina avgerð hjá Mentamálastýrinum um ikki at keypa høllina, tá ið hugsað verður um, at stýrið hevur nýtt serliga sakkunnleikan í málsviðgerðini og annars tryggjað sær, at øll viðurskifti eru í lagi, áðrenn keypið verður framt.

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14:00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



Eingin boring í ár:

# Meiri tíð til gransking og kanningar



*Frá FOIB fundinum í Havn týsdagin*

**Tað er neyvan nøkur vanlukka fyri oljutilgongdina í Føroyum, at eingin boring verður í ár. Hetta gevur nevniliga oljufeløgunum, teirra granskarum og serfrøðingum og eisini føroyskum stovnum meira tíð til at at granska og kanna eitt nú árin á umhvørvi og samfelag**

OLJUFELØG
*Jan Müller*
*Myndir Finnur Justinussen*



*Nógv áhugaverd mál vórðu viðgjørd á fundinum*

Týsdagin hevði FOIB fund í Havn. FOIB ella FOIG stendur fyri Faroese Oil Industry Group. Felagsskapurin er avloysarin hjá GEM, sum í meira enn 5 ár stóð á odda fyri stórum parti av kanningunum í Føroyum í sambandi við oljuleitingina. Tá leitingin byrjaði varð GEM broytt til FOIB, har øll feløgini, sum hava leitiloyvi, eru limir. Feløgini gjalda eitt ávíst gjald til raksturin av felagnum og er budgettið í ár uppá 10 mill. kr. Peningurin verður m.a. brúktur til kanningar og gransking av ymsum slag, eitt nú aldumátingar, kortlegging av umhvørinum oa. Atlanticon stendur fyri øllum tí umsitingarliga partinum av FOIB.

Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess, er formaður í FOIB. Í felagsskapinum eru fimm undirbólkar, sum hvør í sínum lagi hevur ábyrgdina av kanningum og gransking innan tey ymsu økini, ið eru tengd at leit-ing og eini komandi føroyskari oljuvinnu. Stýringsbólkurin í FOIB, har umboð eru fyri øll feløgini, hevur fýra fundir um árið. Á fundinum hesaferð, sum varð á Hotel Føroyum, tóku teir fimm oddamenninir í teimum ymsu bólkunum samanum og greiddu frá støðuni og úrslitunum av kanningunum.

### Boring á Glyvursnesi

FOIB hevur so eisini tætt samband við Sindri, sum er felag umboðandi allar lisenshavararnar og sum burturav tekur sær av verkætlanum, sum hava til endamál at granska í og kanna viðurskifti í sambandi við loyvini á føroyskum øki. Í løtuni eru fólk frá Sindri í ferð við at gera ymsar kanningar á Nólsoyarfirði og á Glyvursnesi. Endamálið við hesum kanningum er at vita, hvussu seismikkurin ber seg at í basalti og at kanna tjúkku basaltfláirnar, sum kunnu fjala møgulig oljuberandi løg í undirgrundini. Trupulleikin er tann, at tað er sera torført at brúka seismikk til at siga okkum nærri, hvat er undir basaltfláunum. Fyri at fáa meira at vita um hetta og um basaltið sum heild verða seismiskar kanningar gjørdar, og ætlanin er eisini, at ein grunn vísindalig boring skal gerast á Glyvursnesi.

Í sambandi við seismisku kanningarnar á Nólsoyarfirði verður kandidatritgerð skrivað, har tað m.a. verður hugt at árinunum, sum seismikkskjótingin hevur á laksin í Nólsoyarfirði.



*Ben Arabo formaður í FOIB*

Ben Arabo, formaður í FOIB sigur seg annars verða væl nøgdan við arbeiði hjá teimum ymsu undirbólkunum í FOIB. Har gongur alt sína leið og heldur innsavnanin av data frá føroyskum øki fram eins og granskað verður víðari. –Vit eru væl nøgdir við gongdina. Árið í ár við ongum boringum gevur okkum so eitt gott høvi til at brúka meira tíð uppá vísindaligu kanningarnar.

Nú GEM og FOIB hava virkað í fimm ár gevst Halvor Snarvold sum ein av oddamonnunum og harvið eisini undangongumonnunum í arbeiðinum hjá hesum so týðandi felagsskapum. Hann hevur øll árini havt stýringina og tilrættaleggingina av arbeiðinum um hendi.